# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

Berglon, Runavík:

## Nýtt handilshús á 1.700 fermetrum

**Leygardagin 28. apríl læt nýggja handilshúsið "Berglon" upp í Runavík**

*Myndir: Jonhard Hammer*

Talan er um eitt handilshús, sum er ein ramanrenning av trimum handlum í økinum, leikabúðini "Leika", gávubúðini "Gávan" og útgerðarbúðini "Teymar".

Gólvvíddin í øllum húsinum er tilsamans 1760 fermetrar. Harav fara so goymsla, skrivstova og starvsfólkarúm. Sjálv handilshølini er umleið 1200 fermetrar.

"Teymavirkið", sum fyrr helt til í sama bygningi, er nú flutt í nýggjan bygning í Søldarfirði.

Umframt "Teymavirkið" hoyrir eisini "Snørisvirkið" í Klaksvík við til fyritøkuna, sum Rúni Berg í Runavík er stjóri á.

Fyritøkan er upprunaliga frá 1961, tá pápi Rúna, Ove Berg í Runavík, byrjaði at framleiða teymar.

**mg**





*Anette Sonne frá Orkis og Eyðvør Berg, Berglon*



*Selma, Jónvá og Malan avgreiða kundar. Malan er dagligur leiðari í Berglon*

ICON, Runavík:

## Nýggjasti mótin til mannfólk

**Leygardagin 28. apríl læt enn ein nýggjur handil upp í Runavík**

Talan er um mannfólkahandilin ICON, ið er ein klædnahandil til menn um 16 ára aldur og uppeftir.

Nýggi handilin leggur seg serliga eftir at selja nýggj merki, sum ikki hava verið at fáa í Føroyum áður, sum t.d. Frank-Q (Frankjú), Park og Kaporal5. Eisini er stórt úrval av kendu smúkkunum til mannfólk av merkinum Dyrberg/Kern at fáa.

Tað er Sunrid Olsen í Saltnesi, sum eigur handilin. Sunrid eigur eisini mótahandilin "Shari" í Runavík og konufólkahandilin "Touche" á Áarvegnum í Havn.

Leiðari á handlinum er Óluva Højgaard í Rituvík, ið hevur lært í mótahandlinum Shari.

**mg**





*Starvsfólkini í ICON í Runavík f.v.: Óluva Højgaard, leiðari, Poula Ellingsgaard og Sunrid Olsen, sum eigur handilin*

*Myndir: J. Hammer*